Vegleiðing

# Synopsupróvtøkuháttur

í donskum

(9. flokkur)

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Februar 2021

# Próvtøkuháttur B – synopsupróvtøkuhátturin

Fakligu økini í próvtøkuhátti B (synopsupróvtøkuháttinum) eru tey somu sum í próvtøkuhátti A, men í tilgongdini, t.e. í fyrireikingini til próvtøkuna og í metingarstøðinum, eru eyðsýniligir munir, sum lærari og próvdómari skulu hava í huga.

Størsti munur millum próvtøkuhátt A og B (synopsupróvtøkuháttin) er, at fyrireikingin til synopsupróvtøkuna fer fram sum próvtøkufyrireiking eftir at skrivligu próvtøkurnar eru loknar. Lærarin er vegleiðari undir tilgongdini. Næmingar hava eisini møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við fyrireikingunum uttan fyri skúlatíð.

# Tilgongdin, tá ið synopsuhátturin verður nýttur

## 1. Hugdýpingarøkini verða skipað við støði í framdum undirvísingargongdum, ið eru skjalfestar

Hálvan mars kunnu lærari og næmingar arbeiða í felag við at orða og skipa tey endaligu hugdýpingarøkini. Hetta verður gjørt við støði í tilfari og fakligum tilgongdum, sum flokkurin hevur arbeitt við í 8. og 9. flokki. Hugdýpingarøkini verða lýst og fáa yvirskrift. Eitt hugdýpingarøki fevnir um einar 4-6 tekstir.

Næmingurin granskar evnið og skrivar eina synopsu, sum hann letur inn 7 yrkadagar undan seinasta undirvísingardegi. Próvhoyrarin skal góðkenna synopsuna áðrenn seinasta undirvísingardag.

Í fyrsta lagi 1. apríl kann lutakast um hugdýpingarøkini verða. Um so er, at 1. apríl liggur í páskaferiuni, kann lutakastið flytast til fríggjadagin fyri páskaferiuna.

Einstaka hugdýpingarøkið tekur støði í fakliga innihaldinum í lærugreinini, tað skal kunna haldast upp ímóti tekstslagi, tema, tíðarskeiði, rithøvundi ella tílíkum. Kærleiki kann t.d. ikki vera eitt hugdýpingarøki, tí evnið kann verða viðgjørt í ymiskum fakligum høpum. Men *Kærleiki lýstur í stuttsøgum*, ella *Kærleiki lýstur í yrkingum eftir kvinnuligar rithøvundar*, kunnu vera hugdýpingarøki.

Gjøgnumgingið tilfar í 8. og 9. flokki, sambært skjølunum *Undirvísingargongd* og *Ársætlan fyri lærugrein*, er grundarlagið, tá ið hugdýpingarøkini verða vald, orðaði og lýst (eldri og nýggjari fagrar bókmentir, yrkistekstir úr dagbløðum og tílíkum, filmar, myndir, netsíður, telduspøl o.a.m.).

Møguleiki er at arbeiða saman og skriva synopsuna í bólki, við í mesta lagi 3 næmingum. Næmingarnir verða tó altíð próvhoyrdir hvør sær.

Áðrenn farið verður undir at orða og lýsa hugdýpingarøkini, skulu næmingarnir gera av, um teir vilja arbeiða í bólki, ella um teir vilja arbeiða einsæris.

Lutakastið skal fevna um í minsta lagi 20 ymisk hugdýpingarøki, og seinasti næmingur ella bólkur skal hava í minsta lagi 5 hugdýpingarøki at velja í.

Tekstir kunnu ganga um aftur í ymiskum hugdýpingarøkjum.

### *Dømi um hugdýpingarøki*

- salmen som genre
- kærlighedsnoveller
- dokumentarfilm
- kriminoveller
- essay med temaet unge
- kvindelige forfattere i det 20. århundrede
- internet – webside om TV2
- kunsteventyr af H. C. Andersen
- ...
- ...

### *Tíðarætlan/ráðlegging*

- Hálvan mars.

## 2. Lutakast um hugdýpingarøki

Lutakastið um hugdýpingarøki kann fara fram í fyrsta lagi 1. apríl. Um so er, at 1. apríl liggur í páskaferiuni, kann lutakastið flytast til fríggjadagin fyri páskaferiuna.  Tá ið lutakastið fer fram, er skúlastjórin hjástaddur.

Hvør næmingur ella bólkur fær við lutakasti tillutað eitt hugdýpingarøki at arbeiða við. Hugdýpingarøkið er eitt fakligt øki, sum øll próvtøkan er grundað á. Næmingurin skal við vegleiðing frá læraranum velja sín egna próvtøkutekst við støði í hugdýpingarøkinum, sum hann hevur fingið við lutakasti.

Næmingarnir kunnu arbeiða einsæris ella saman í bólki, sum í mesta lagi fevnir um 3 næmingar, men teir fara altíð til próvtøku einsæris.

Próvtøkan byrjar, tá ið hvør næmingur/bólkur hevur drigið eitt hugdýpingarøki. Øll undirvísing, ið hevur við synopsupróvtøkuna at gera, er nú endað. Undirvísast kann í munnligum tilfari, ið ikki skal nýtast til próvtøkuna. Undirvísast kann í øllum skrivligum tilfari.

Næmingurin/bólkurin finnur við vegleiðing frá læraranum próvtøkutekstin og annað hóskandi tilfar, ið er knýtt at próvtøkutekstinum.

### *Tíðarætlan/ráðlegging*

- Í fyrsta lagi 1. apríl kann lutakast um hugdýpingarøkini verða. Um so er, at 1. apríl liggur í páskaferiuni, kann lutakastið flytast til fríggjadagin fyri páskaferiuna.
- Nú møguleiki er fyri at skipa arbeiðið við synopsu sjálvur, er týdningarmikið at hava ásettu tíðarfreistir og ásetingar í huga, sum m.a. eru:

### At finna próvtøkutekst og tilfar til próvtøkutekstin

- 8 klokkutímar í skúlanum (møguliga ein heilan dag umframt einstakar tímar).

- Næmingar arbeiða sjálvstøðugt, lærarin skal vegleiða um møguleikar og arbeiðshættir.

### Lærarin er vegleiðari

- Vegleiðingin fer fram í tímunum, sum eru settir av til arbeiðið.

### Synopsa verður orðað og latin inn

- Við støði í greiningararbeiðinum ger næmingurin/bólkurin eina synopsu, sum skal latast læraranum saman við próvtøkutekstinum í talgildum líki í seinasta lagi 7 yrkadagar undan seinasta undirvísingardegi.
- Lærarin sendir próvdómaranum próvtøkutilfarið, so hetta er honum í hendi í seinasta lagi 7 dagar undan próvtøkuni.

- Næmingar finna (saman við læraranum) próvtøkutekst og annað hóskandi tilfar.

## 3. At finna próvtøkutekst og tilfar til próvtøkutekstin

Tíðarkarmur til samlaðu vegleiðingina er 8 klokkutímar, har næmingurin/bólkurin nágreiniliga kannar møguleikarnar innan fyri tað hugdýpingarøkið, hann hevur fingið við lutakasti.

Próvtøkuteksturin er tekstur, sum næmingurin sjálvur velur sum grundarlag undir synopsu, og teksturin skal ikki vera partur av gjøgnumgingnum tilfari í flokkinum.

- Próvtøkutekstur er tekstur í víðastu merking, t.e. alt frá skrivaðum teksti til livandi myndir, tekstur í bundnum og óbundnum máli, gerandistekstur úr dagbløðum (eitt nú greinar, lesarabrøv, lýsingar og myndir), vegleiðingar, videoupptøkur, filmur, útvarps- og sjónvarpssendingar, tónleikur og sjónleikur.

Næmingurin skal við hjálp og vegleiðing frá læraranum sjálvur velja próvtøkutekstin og finna fram tilfar til próvtøkutekstin. Næmingurin arbeiðir síðan við próvtøkutekstin, serliga við at greina og tulka, og ger synopsu.

Próvtøkuteksturin, ið er tann tekstur, sum næmingurin skal viðgera og leggja fram til próvtøku, kann í vavi vera í mesta lagi 10 normalsíður, og lærarin skal góðkenna hann. Ein normalsíða er 1300 tekn, tá ið talan er um tekst í óbundnum formi, og 30 reglur, tá ið talan er um tekst í bundnum formi. Um próvtøkuteksturin t.d. er ein filmur ella skaldsøga, er skilagott, um próvtakarin velur ein part burturúr til greining og tulking – tað kann vera ávís leikmynd, ella tað, at fylgja einum ávísum persóni í filminum.

Í hesum tíðarskeiði fáa næmingarnir vegleiðing frá læraranum í skúlatíðini, men teir kunnu eisini arbeiða við fyrireikingunum uttan fyri skúlatíð.

#### *Tíðarætlan/ráðlegging*

- 8 klokkutímar í skúlanum (møguliga ein heilan dag umframt einstakar tímar).
- Næmingar arbeiða sjálvstøðugt, lærarin skal vegleiða um møguleikar og arbeiðshættir.

## 4. Lærarin er vegleiðari

Lærarin er vegleiðari í allari fyrireikingartilgongdini hjá próvtakaranum. Sum vegleiðari skal lærarin meta um próvtøkutekstin hjá næminginum. Hann kann t.d. geva næminginum uppskot um kanningarøki og vegleiða um tilgongd til økið, men hann skal ikki fara inn í greiningar- og tulkingararbeiðið hjá næmingunum.

Lærarin skal góðkenna próvtøkutekstin.

### *Tíðarætlan/ráðlegging*

- Vegleiðingin fer fram í tímunum, sum eru settir av til arbeiðið.

## 5. Synopsa verður orðað og latin inn

Við støði í greiningararbeiðinum ger næmingurin/bólkurin eina synopsu, sum skal latast læraranum saman við próvtøkutekstinum, talgilt ella í pappírsformi. Lærarin sendir próvdómaranum eitt eintak av synopsu og próvtøkuteksti talgilt ella í pappírsformi.

Næmingurin skal til egna nýtslu sjálvur hava við sær alt tilfar, sum skal nýtast í sambandi við próvtøkuna.

Lærarin sendir próvdómaranum próvtøkutilfarið, so hetta er honum í hendi í seinasta lagi 7 dagar undan próvtøkuni. Próvtøkutilfarið hjá einstaka næminginum ella bólkinum er próvtøkuteksturin, synopsan og tekstirnir í hugdýpingarøkinum. Næmingar, sum arbeiða í bólki, kunnu gera synopsu hvør sær ella í felag.

### *Synopsuskjalið*

Synopsuskjalið, sum er øll synopsan, skal fevna um hetta:

Forsíðu

- Navn, flokkur, lærari og skúli, lærugrein og próvtøkustig, upplýsing um møguligt bólkaarbeiði
- Heiti á hugdýpingarøk
- Tilfar í hugdýpingarøkinum

Síða 2 og 3

- Frágreiðing um valda próvtøkutekstin og grundgeving fyri valinum
- Framløguætlan fyri munnligu próvtøkuna
- Greiningin og tulkingarøkini verða lýst
- Frásjónarøkini verða lýst
- Tekstbrot til upplestur verður ásett
- Keldulisti (viðurkendur stílur skal nýtast).

Synopsuskjal at fylla út kann takast niður av heimasíðuni www.namsaetlanir.net

### *Tíðarætlan/ráðlegging*

- Næmingurin letur læraranum próvtøkutilfarið (próvtøkutekst, synopsu og tekstirnar í hugdýpingarøkinum) í seinasta lagi 7 yrkadagar undan seinasta undirvísingardegi. Lærarin sendir próvdómaranum tilfarið í seinasta lagi 7 dagar undan munnligu próvtøkuni.

## 6. Próvhoyring og dømingargrundarlag

Munnliga próvtøkan varir 24 minuttir, íroknað meting og próvtalsgeving.
Eingin serstøk tíð er til fyrireiking. Próvtøkan verður skipað við framløgu, upplestri og samrøðu millum próvtakara og próvhoyrara/próvdómara.

Í framløguni skal próvtakarin lýsa arbeiðið og arbeiðstilgongdina. Hetta fevnir m.a. um lýsing av tekstslagnum, greining og tulking, umframt frásjónargerð til hugdýpingarøkið.

Til upplestur hevur próvtakarin valt eitt tekstbrot, ið svarar til uml. 1/3 normalsíðu. Próvtakarin ger sjálvur av, nær í próvhoyringini, upplesturin skal vera.

Próvhoyringin tekur støði í framløgu próvtakarans av próvtøkutekstinum, sum próvtakarin hevur arbeitt við, og hon er ein samrøða millum próvhoyrara og próvtakara, har próvdómarin kann seta dýpandi spurningar.

Próvtakarin skal vísa innlit í innihaldið í próvtøkutekstinum og í samsvari við hugdýpingarøkið sýna, at hann á greiðum og fjølbroyttum máli dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í hugdýpingarøkinum.

Í samrøðuni skal próvtakarin sýna innlit í fakligt hugtøk og evni og duga at taka týdningarmiklar tættir fram.

Próvtakarin skal ikki lesa hart burtur úr egnum skrivligum tilfari (upprit, viðmerkingar o.s.fr.) til próvtøkuna, men kann styðja seg til egnar uppskriftir.

### *Dømingargrundarlag*

Orsakað av arbeiðstilgongdini í sambandi við próvtøkuhátt B (synopsuprovtøku), verður størri dentur lagdur á yvirlit, hugdýping, innlit og frásjónargerð enn gjørt verður, tá ið próvtøkuháttur A verður nýttur.

Í metingini av avriki próvtakarans verður hugt eftir hvussu væl synopsan er skipað, eitt nú við atliti at greidleika, innihaldi, málburði, keldulista, stav- og teknseting, og eftir munnliga avrikinum.

Dentur verður lagdur á evni próvtakarans at tulka tekst, meta um hann og at seta hann í frásjón, umframt evnini at lýsa samspælið millum mál, innihald, tekstslag og høpi. Eisini verður hugt eftir greinandi førleikum próvtakarans í sambandi við bókmentir og onnur tekstsløg. Dentur verður lagdur á greiðan málburð, fjølbroytta og trygga nýtslu av viðkomandi hugtøkum, at framløgan er samanhangandi, at upplesturin er greiður og flótandi og vísir persónligu fatan próvtakarans av tí lisna.

Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.

### *Til próvtøkuna hevur próvtakarin við sær*

- próvtøkutekstin (sum próvhoyrari og próvdómari hava fingið sambært pkt. 5)
- synopsuna (sum próvhoyrari og próvdómari hava fingið sambært pkt. 5)
- upprit/viðmerkingar
- tekstbrotið, sum hann skal lesa upp, og sum hann sjálvur hevur valt.